# Íslendskt listaframsýning í Smiðjuni

*Í næstu viku ferð íslendski listamaðurin Ketill Larsen, at sýna fram í Smiðjuni í Lítluvík. Ketil er sera fjølbroyttur listamaður, sum umframt at mála eisini tekst við at yrkja, syngja, spæla sjónleik og upplestur*



Sveinur Tróndarson

Í næstu viku letur upp forkunnug framsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Framsýningin ber heitið »Eitt lot úr øðrum heimi« og er tað íslendski listamaðurin Ketill Larsen, sum sýnir fram.

Motivini, sum Ketill málar hava íkki útgangsstøði í okkara heimi. Allar tær 28 framsýningarnar úr hansara hond hava borið eitt heitið, sum hevur okkurt við ein annan heim at gera. Orsøkin til hetta er, at íblásturin, sum Ketill fær til myndir sínar, kemur úr einum heimi, øðrum enn okkara.

### Verið víða um

Ketill Larsen er ikki nýggjur framsýnari - minni enn so. Hann hevur, sum nevnt, havt 28 framsýningar og hann hevur ferðast víða við listini.

Hetta er fyrsta ferðin, hann sýnir fram í Føroyum, men annars hevur hann bæði havt framsýningar í Kenja og Danmark, og seinni í ár fer hann at hava framsýning í Vinnipeg í Kanada og í Attens, sum liggur skamt frá Milano í Italia.

Framsýning Ketills í Føroyum verður sostatt tann 29. í røðini.

### Leikmaður og sangari

Tað var nú ikki sum málari, at Ketill fyrst gjørdist kenur. Hann tókst við leiklist í fleiri ár áðrenn hann av álvara tók pensilin í hond, og hann hevur enntá gingið á tveium leiklistaskúlum gjøgnum tíðina.

Árini 1962 til 1964 gekk hann á leiklistaskúlanum Ævar Kvasir og hann helt fram á leiklistaskúlanum hjá íslendska tjóðleikhúsinum til 1967. Hann hevur m. a. starvast sum leikari hjá ungdómsráðnum í Reykjavík.

Fjølbroytni er eisini eitt sermerkið, sum passar væl til Ketill Larsen, tí umframt at vera leiklistamaður eisini, er hann bæði sangari, jólamaður og upplesari.

Honum dámar sera væl vísusang og hann er sera kendur trubadurur. Hann hevur gjørt ein hóp av tónleikastykkjum og banduppptøkur av hesum eru ofta at hoyra á framsýningum hansara. Viðhvørt kann hann eisini finna uppá, at bera fram onkra av yrkingum sínum.

## Konsert á Giljanesi

Konsert við sangi, klaver, og violin, verður í skúlanum á Giljanesi sunnudagin 30.4.00 klokkan 15.30, og í Vestmanna skúla klokkan 19.00.

Skráin er:
Ved rundarne E. Grieg
Våren E. Grieg
Solveigs sang E. Grieg
Sol, måne og stjerner úr skapanini (skrivað1999) Jens Fredborg
Steðgur
Violinsonata í A dur av G.F. Händel
I know that my redeemer liveth úr Messias av G. F. Händel
Arie Cherubin „Sagt holde Frauen“ úr Brúðleyp Figaros W.A. Mozart
Dank sei Dir Herr G.F.Händel
Tónleikararnir eru:
Martin R. Jacobsen klaver, Petra Iversen sang, og Annette Nielsen violin.

## Tær komu aftur við fyrstu virðisløn

Tveir næmingar úr Nes Sóknar Musikkskúla, ið vóru við í eini tónleikakapping niðri í Keypmannahavn, sum blaðhúsið Berlingske skipar fyri, gjørdu musikkskúlanum miklan heiður og komu aftur við fyrstu virðisløn.

Tær báðar genturnar úr Runavík, Bodil Simonsen og Fríðhild Hansen, hava í átta ár spælt tvørfloytu í Nes Sóknar Musikkskúla. Núverandi lærari teirra, Katja Volovelskaja, avgjørdi í heyst at melda tær til hesa kapping niðri í Danmark. Fyri at vera við í kappingini skalt tú ikki vera fyltur 17 ár. Tær ganga í 10. flokki, so skuldi tað vera, so mátti tað vera nú. Lærarin metti, at tær nú vóru á einum slíkum støði, at tað mundi fara at bera til. Áræði hava tær alla tíðina havt, so har var einki at ivast í.

Í longri tíð hava tær báðar vant dúgliga bæði heima og í skúlanum. Mangan hava tær havt floyturnar við í skúla, soleiðis at venjast kundi í fríkorterunum. Katja, ið hevur givið teimum dygga undirvísing hesi bæði seinastu árini, hevur roynt at útvegað teimum allar teir venjingarmøguleikar, ið til bar. Ein stuðul í hesum arbeiði, hevur Jóhannes Andreasen eisini verið. Hann hevði fylgispælið bæði til venjingarnar her heima og til kappingina í Keypmannahavn.

Mikukvøldið í síðstu viku var konsert í býráðshøllini í Runavík, har Fríðhild og Bodil fingu høvi at vísa áhoyrarunum, hvat tær dugdu til. Tær komu væl frá sínum kappingarstykki og kundu tí við góðum treysti fara av landinum. Leygardagin skuldi so slagið standa á Flatlondum. Tær vístu, at eisini tá ið á stendur, er stirðil í teimum, soleiðis at dómsnevndin avgjørdi at geva teimum fyrstu virðisløn fyri avrik teirra.

Stuttligt var hjá teimum at koma í skúla í Runavík týsmorgunin. Tíggjundi flokkur stóð og veittraði við fløggum, og allir næmingarnir fagnaðu teimum óført til morgunsangin. Hátíðarlig var løtan, tá skúlans leiðsla handaði teimum gávur sum eina viðurkenning fyri tað úrslit, tær høvdu fingið.

So er bert at vóna, at hesar ungu, evnaríku genturnar halda fram at arbeiða við tvørfloytuni, soleiðis at vit sleppa at hoyra tær eisini

## Íslendsk konsert í Norðurlandahúsinum

Mikudagin 10. mai 2000 kl. 19.30 verður konsert við íslendsku Sólrun Bragadóttir, sopran og norðmanninum Einar Steen Nøkleberg, piano.

Eitt sindur um tey bæði:

**Sólrun Bragadóttir** er fødd í Íslandi og byrjaði at fáa sangundirvísing við konservatoriið í Reykjavík. Síðani fór hon til U.S.A. at lesa víðari við lærda háskúlan Indiana í Bloomington, haðani hon tók prógv. Umframt at ganga á lærdum háskúla, var Sólrun Bragadóttir á nógvum sangskeiðum.

Hennara fyrsta starv var við við Pfalztheater in Kaiseslautern, í Týsklandi, síðani starvaðist hon í fýra ár í Hannover og arbeiddi umframt á Deutsche Oper am Rhein í Düsseldorf. Sólrun hevur eisini havt fleiri høvuðssanglutir í Týsklandi t.d. á Bayerische Staatsoper í München, í Bremen, í Mannheim, í Kassel, í Kiel, í Karlsruhe og í Heidelberg. Sólrun Bragadóttir hevur arbeitt í Bern, í Schweiz, í Avignon í Frankaríki, í Liége í Belgien, Belfast í Írlandi og so eisini í Japan og í Íslandi. Í dag arbeiðir Sólrun Bragadóttir sum freelance songkvinna.

Bragadóttir hevur eina víðfatandi sangskrá, sum eisini telur italskar, franskar og týskar sangir. Hon er væl dámd bæði í Íslandi og aðrastaðni í Europa. Hon hevur ofta verið at hoyrt í íslendska sjónvarpinum og luttikið í tiltøkum, sum eru vorðin send ymsastaðni í Europa.





**Einar Steen Nøkleberg** verður i dag hildin at verða ein hin besti pianospælarin í Noregi og hevur verið við á nøgvum altjóða konsertum og hevur spælt inn fløgur. Lærarar hansara vóru Nicolai Dirdal og Hans Leygraf . Í 1968 vann hann virðislønina hjá German High School Piano Competition.

Hann hevur eisini vunnið aðrar viðislønir, eitt nú norsku pianovirðislønina í 1972, í 1975 norsku kritikkvirðislønina, Lindemanns virðislønina í 1984 og Grieg virðislønina bæði í 1985 og í 1992.

Tey síðsu árini hevur Einar Steen Nøkleberg arbeitt nógv ymsastaðni í útlandinum og er vorðin kendur. Hann hevur spælt bæði einsamallur og saman við orkestri.

Í løtuni er Einar Steen Nøkleberg professari við lærda tónleikara- og sjónleikaraskúlan í Hannover, í Týsklandi.

Á skránni á konsertini í Norðurlandahúsinum verða norðurlendskir sangir/løg at hoyra t.d. Carl Nielsen, Emil Sjögren, Carl Sjögren, Jean Sibelius, Atli Heimir Sveinsson, Edward Grieg og Ture Rangström.

Atgongumerkini til konsertina fáast í Kunningarstovuni í Havn og í Norðurlandahúsinum.



# Fylgdu væl við manningunum

*Fjølmiðlarnir á leiðini fylgdu væl við kappróðrinum í gig á Scillyoyggjunum, har gnturnar á Jarnbardi rættiliga gjørdu øll bilsin við sínum góðu úrslitum*

Dagfinn Olsen

Um vikuskiftið luttóku føroysk kappróðrarfólk í heimsmeistarakapping á Scillyoyggjunum. Í besta veðrið fór henda árliga hending av bakkastokki millum tær vøkru og eksotisku oyggjarnar.

Eingin ivi er um, at tá føroysku genturnar løgdu til brots í føroyskt mannaðu Sowennu, so gekk strúkandi. Longu í fyrsta róðri gjørdust tær nummar tvey, men tær fylgdu í hølunum á heimsmeistarunum frá í fjør, og sigldu tískil innanskers. Hetta endaði við koldøming og endaðu báðir bátar í bólk B.

Fjølmiðlarnir fylgdu væl við og greiddu frá og kunngjørdu støðuna. Og sum blaðið Western Morning News skrivaði, so bardu báðir bátar seg aftur upp í A bólkin.

Genturnar endaðu á einum samanløgdum 5. plássi, ið má metast at vera væl frágingið, og tað var heldur ikki frítt, at túnatosið var um kvinnurnar á Jarnbardi, ið stóðu seg so væl í síni fyrstu kappingarroynd í gig, ið er heitið á bátaslagnum.

Dreingjamanningin á Eysturoyingi var við fyri 2. ferð. Í fjør fingu teir eitt flott 8. pláss, men hóast teir undir venjing høvdu fingið betri úrslit, enn í fjør, so rakk ikki til.





*Tað var gentumanningin á Jarnbardi og dreingirnir á Eysturoyingi, ið mannaðu Sowennu í ár á Scillyoyggjunum*

Teir fingu eitt samanlagt 16. pláss í ár og ásannaðu, at kappingin var harðari í ár, enn í fjør.

Tað eru vinnarar hjá 10 mannaførum, ið sleppa avstað til heimsmeistarakappingina í gig á Scillyoyggjunum, so ei at ivast í, at eysturoyingar miða eftir at gerast fremstir aftur í ár.

Men fleiri eru eftir hesi gularótini og nýggir bátar eru í fleiri feløgumí ár.

Á Scillyoyggjunum liva tey 1700 fólkini fyri stóran part av ferðavinnu og eisini ein væl nøgdur vertur á Harbourside Hotel slapp til orðanna í avísini. Hjá honum var alt gistingarhúsið bílagt til føroyingar, og kom hetta væl við hjá honum.


Island ladies' gig triumph

*Fjølmiðlarnir fylgdu væl við heimsmeistarakappingini í gig, har føroysk manning fekk eitt 5. pláss*

## MR2'arin




Neil Joensen
praktikantur

Fyrst í apríl kom hesin stásiligi sportsbilurin til Føroyar. Lítið vistu fólk um hendan bilin, tey flest kendu hann kanska ikki. Nú er hann so komin.

Hetta man verða ein tann frekasti sportsbilurin í Føroyum. Við sínum 5 geraða, 4 cylindraða, 1,8 VVT-i, 140 Hk centermotori, standur hann bara klárur at verða útluftaður.

Hesin bilurin líkist meira til rasarasportin, av tí at hann er bakhjulstrektur, hevur centermotor, sum gevur vilinum sama vektfordeiling, sum bilarnir í rasarasportinum, og hjólini er sett ytst út í hjørnini, so at hann tekur svingini sum ein dreymur.

Komin inn í bilin er tað sum um man søkkur niður í setrini, ein lágur bilur. 950 kg væl býtt gevur bilinum eitt upptrekk frá 0-100km/t uppá 8,1sek.

Bíligur er hann ikki, 268.400 kr, men tá ið ein er komin í hann, eru pengarnir tað verdir.

Nógv meira kann ikki sigast um hendan bilin, enn at hann er ein sportsbilur við klassa.


Bilsølustevna

Á Giljanesi 6. og 7. mai

Stevnuluttakarar eru:
• Reyni Service • Mazda • Ivan Johansen bilar •
• Bilsølan v/ Øssur Jóhannesen • Norðbil •
• D. B. Bilar • Eybjørn Hansen Bilasøla •
• Súkkluhandilin í Kollafirði • Ley •

FS UÁGAR

Leygardagin 6. mai
Kl. 14.00 Stevnan letur upp.
Kl. 15.00 Stevnan verður sett av Petur Kruse, bygdaráðsformanni í Sørvági.
Kl. 17.00 Næmingar royna at seta met: Hvussu nógvir av teimum passa í ein bil í senn?
Kl. 18.00 Ragnar í Vík undirheldur.
Kl. 19.00 Mótashow.
Kl. 21.00 Stevnan letur aftur.

Sunnudagin 7. mai
Kl. 14.00 Stevnan letur upp.
Kl. 15.00 Køkutombola
Kl. 17.00 Ragnar í Vík undirheldur.
Kl. 18.00 Besti útróðrarbátur 1999 verður heiðraður.
Kl. 18.30 Mótashow.
Kl. 21.00 Stevnan letur aftur.

Undirhald fyri børn
Báðar dagarnar verður undirhald fyri børn í fimleikarahøllini so sum:
• Bóltkast
• Fiskibrunnur
• Barnatombola v.m.

Kl. 18.00-21.00 Passar títt PassWord?
Møguleiki verður at keypa lutaseðlar (á 30 kr.) har nummarið á seðlinum verður roynt sum password á teldu sunnudagin frá kl. 18.00 til 21.00.
Passar títt password kanst tú vinna:
1. Eina teldu 2. 500 ltr. av olju ella 3. Video bandspælara.
Bert 1000 seðlar eru prentaðir!

Sosialurin - 311820

FS UÁGAR